

## Tryggur sigur til Liverpool

Við einum tryggum 3-0 sigri tók Liverpool fyrsta stikkið í Champions League-kvartfinaluni ímóti PSV Eindhoven, tá ið liðini brustu saman í Eindhoven í kvøld
Tað vóru Steven Gerrard, John Arne Riise og Peter Crouch, sum gjørdu málini fyri enska stórfelagið, sum við sigrinum hevur meiri enn annað beinið í hálvfinaluni.

## Van Buyten tryggjaði Bayern javnleik

Tað var í yvirtíðini, at Bayern Munchen megnaði at javna móti italsku kempunum. Pirlo legði AC Milan á odda við einum góðum stútara, men van Buyten javnaði á San Siro til stóra gleði fyri týsku viðhaldsfólkini.
Gleðin var tó stokkut, tí stutt eftir útjavnandi málið skoraði Kaka við brotssparkið so støðan gjørdist 2-1 til AC Milan. Tað sá eisini út til, at italiumenn fóru at vinna dystin, men tríggjar minuttir inni í yvirtíðini javnaði van Buyten fyri týskarar. Harvið tryggjaði hann týskarum eitt gott útgangsstøði til returdystin í Munchen um tvær vikur.

# Allir klárir til páskalittar uppgerðir

**Páskalitir fara at prýða Gundadal um páskirnar, tá fyrst B71 og so GÍ í sínum gulbláu búnum koma á vitjan hjá HB, sum hevur allar mans tøkar og landsliðsleikararnar úthvíldar**

HB
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

HB kom flúgvandi frá byrjan og smurdi Skála av á útivølli. Hetta gjørdu teir, samstundis sum landsliðsleikararnir Jákup á Borg og Christian Høgni Jacobsen ikki komu inn fyrr enn nakað inn í seinna hálvleik, og Rógvi Jacobsen stutt eftir steðgin.
Tætta skráin um páskirnar og strævna landsliðsferðin í Georgia var orsøkin til, at Krzysztof Popczynski valdi at spara nakrar leikarar farna sunnudag, so venjarin hevur ikki bara allar mans tøkar, men eisini úthvíldar landsliðsleikarar at taka av.
HB hevur annars mangan havt tað trupult á Skála, men stórsigurin hevur av álvara sparka havnarliðið í gongd, og nú fara teir eftir seks stigum tilsamans móti B71 skírisdag og GÍ annan páskadag.
Eingin ivi skal vera um, at HB er stórfavorittar til dystin móti B71 í morgin, men mánadagin er uppgávan heldur torførari, tá GÍ vitjar. Tí skurarnir høvdu takið á meistarunum í fjør. Teir vunnu teir báðar fyrstu dystirnar við einum málið hvørja ferð, men vóru settir so dyggiliga upp á pláss seinasta dystin teirra millum, tá HB vann við fýra málum móti einum.
Spennandi verður at fylgja hesum dysti, eins væl tað verður at fylgja dystinum móti uppflytarunum, tí HB krevur fulla úrtøku úr dystunum báðum.




# Krevja seks stig í Streymnesi

**EB/Streymur ætlar sær at fáa seks stig burtur úr dystunum um páskirnar. Til uppgávuna hava teir allar mans tøkar. Einasta undantakið er Arnbjørn Hansen, sum hevur brotið beinið**

EB/STREYMUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Úrslitaliga var talan um eina ynskibyrjan hjá EB/Streymi, tá teir komu aftur við trimum stigum úr Gøtu farna sunnudag. Men hóast tey eru fegin um útivallarsigurin í Sundalagnum, so hava tey lagt dystin aftur um bak og síggja nú fram ímóti ársins fyrstu landskappingardystum á nýggja heimavøllinum í Streymnesi.
Ársins útgáva av landskappingini er byrjað harðliga. Sunnudagin vórðu fyrstu dystirnir spældir, hósdagin næsti og mánadagin triði. Tríggjar dystir innan átta dagar er krevjandi og møðsamt, og tí vandi felagsliðið ikki í gjár. Teir hildu frí og løddu battaríini, soleiðis at teir fáa hála tveir sigrar heim um páskirnar.
Seks stig er kravið burtur úr dystunum móti Skála og AB, og tað átti ikki at verið nøkur ómøgulig uppgáva hjá EB/Streymi, sum hevur heimavøll báðar dystirnar. Eydnast hetta, er felagsliðið veruliga komið gott frá ársbyrjan.
Til uppgávuna hevur EB/Streymur allar mans tøkar. Einasta undantakið er ársins stjørnuskot í fjør, Arnbjørn Hansen, sum breyt eitt bein í fótinum í dystinum móti B71.
Eydnast tað at vinna hesar báðar dystirnar, so er EB/Streymur bert ein dyst frá at hava fingið somu byrjan sum í fjør, tá teir vunnu fýra dystir á rað, áðrenn teir vóru koppaðir.
EB/Streymur og GÍ møttu hvørjum øðrum tríggjar ferðir í fjør. Felagsliðið úr Sundalagnum vann teir báðar fyrstu, og GÍ vann tann síðsta.

# Pauli við aftur um páskirnar

**Pauli Hansen var ikki við á skálaliðnum í dystinum móti HB, men verður við um páskirnar, har Skála hevur tvær truplar útivallar uppgávur**

SKÁLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Skála kundi valla ynskt sær verri byrjan upp á árið, enn eitt stórtap fyri stoltu meistarunum á heimavølli. Á Skála verður ásanna, at talan var um eina serstakliga keðiliga byrjan, men tey ugga seg við, at sjálvt tey allarbestu renna seg í stórtap viðhvørt.
Nú verður uppgávan at reisa seg, men er lættari sagt enn gjørt. Tí fyri framman standa tvær ómetaliga truplar uppgávur á útivølli. Fyrst skulu teir til Streymnes har silvurvinnararnir frá í fjør taka ímóti, og síðani gongur leiðin yvir um fjørðin, har fyrrverandi Skála-venjarin stendur klárur við einum so gott sum fullmannaðum liði.
Skálafólk plaga at taka til, at tey altíð spæla fyri sigrinum, men við truplu páskadystunum fyri framman verður ásannað, at teir skulu lata væl at, um fýra stig verða drigin heim burtur úr uppgerðunum móti EB/Streymi og grannunum úr Runavík.
Til hesar dystir eru skálamenn so gott sum fullmannaðir. Óbi varð vístur av vøllinum móti HB og er tí leikbannaður. Hetta er ein missur, men tað styrkir um liðið, at Pauli Hansen er við aftur. Hann hevur verið skaddur, og sat á beinkinum seinasta dyst. Hesa vikuna hevur hann vant við fullari ferð, og tað er ein eyðsýndur styrkur um liðið, at hann meldar seg kláran aftur.

# AB ætlar sær páskastig

Á Argjum eru tey framvegis hørm um tapið fyri samansetta suðuroyarliðinum. Tá ætlaðu argjamenn sær trý stig, men fingu einki. Tí eru teir ógvuliga uppsettir uppá at fáa stig, helst fleiri, burtur úr páskadystunum móti GÍ og EB/Streymi.
Liðið sær eisini nakað sterkari út nú, enn tað gjørdi móti VB/Sumba. Hanus Jacobsen og Rani D. Christiansen sótu báðir hálvskaddir á beinkinum tá, men eru nú komnir seg heilt og tí skal roknast við, at teir báðir byrja inni.
Men har eisini onkrir skaðar á liðnum. Jón Nielsen hevur trupulleikar við rygginum og verður ikki við, og somuleiðis er tað ivasamt, hvørt Súni Fríði Barbá verður klárur. Hann fekk ein snudd, tá teir spældu í Suðuroy, og hevur ikki vant í vikuni, men á Argjum krossa tey fingrar fyri, at málrevurin verður tøkur til týdningarmiklu dystirnar skírisdag og annan páskadag.

*-rwd*